# VINNUSÍÐURNAR

SAMBAND
JAN MÜLLER
JAN@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

# Byggja aftur tvíkiljur til alivinnuna

**Í einari høll á eystara armi á Borðoyarvík eru nakrir menn hjá KJ Hydraulik í ferð við at gera ein alibát. Hetta er ein sokallað tvíkilja, og hon er tann fyrsta, sum verður smíðað eftir steðg í næstan fýra ár**



ALIVINNAN
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

KJ Hydraulik á Kambsdali og Hydrotech á Eiði vóru tvey av feløgunum, sum fingu at kenna sviðan av bakkastinum í alivinnuni fyri nøkrum árum síðani. Hydrotech hevði tá bygt 17 bátar til alivinnuna, men tá tann seinasti varð latin íslendingum í februar í 2003, var eingin bílegging eftir.

Tí varð avgjørt at lata virkið á Eiði aftur, og bygningurin varð seldur felagnum Faroe Marin Products. Feløgini Hydrotech og KJ Hydraulik vórðu løgd saman í eitt, og virksemið, sum var eftir, varð savnað á Kambsdali. Útlitini í alivinnuni vóru døpur, og útlitini fyri, at KJ Hydraulik skuldi byggja fleiri alibátar, vóru eisini døpur.

## Vend í

Nú hevur alivinnan fótað sær aftur. Útlitini eru góð, og eins og KJ Hydraulik kendi sviðan av bakkastinum í alivinnuni, fær felagið nú ágóðan av vendini.

Í einari høll hjá felagnum Skarðhamri í Klaksvík eru menn hjá KJ Hydraulik í ferð við at gera eina tvíkilju til alifelagið Pan Fish Faroes, ið skal brúka hana til alingina á Oyndarfirði. Hon skal latast eigarunum tann 25. januar. Tann næsta tvíkiljan er eisini bíløgd. Hana skal alifelagið Luna í Gøtu hava. Skrokkurin kemur til Føroya um ársskiftið, og hon skal latast eigarunum síðst í mars næsta ár. Kostnaðurin fyri hvørja liggur um fýra milliónir krónur.

Ólavur Asafsson Olsen, stjóri í KJ Hydraulik, sigur, at teir hava ikki fingið fyrispurningar um fleiri tvíkiljur til alivinnuna enn, men hann hevur kortini vónir um, at onkur kemur afturat.



*Ólavur Asafsson Olsen, stjóri*

*Myndir: Høgni Thomsen*

## Úr Letlandi

Skrokkarnir til tvíkiljurnar verða gjørdir á einari lítlari skipasmiðju í Letlandi og fluttir við farmaskipi til Rotterdam og síðani til Føroya. Letlendska handverkið er gott, og tað hevur eisini víst seg, at skipasmiðjan klárar at lata skrokkarnar til ta ásettu tíðina. Tann, sum nú verður gjørdur liðugur í Klaksvík, varð latin tveir dagar fyri tann ásetta dagin.

Skrokkarnir eru úr stáli, men onkur alari hevur spurt seg fyri um at fáa eina tvíkilju úr aluminium. Men Ólavur Asafsson Olsen sigur, at skulu teir lata tvíkiljur úr aluminium, noyðast teir at finna onkra aðra skipasmiðju til at gera skrokkarnar, tí tað megnar tann letlendska ikki.

Ein av tvíkiljunum, sum Hydrotech á Eiði gjørdi í sínari tíð, var úr aluminium, og tað er ikki óhugsandi, at hetta verður tikið uppaftur. Ólavur Asafsson Olsen sigur, at tey hava umhugsað at fáa útlendskar sveisarar til Føroya eftir sama leisti, sum skipasmiðjan á Skála brúkar, nú hon fer undir at byggja eitt veitingarskip til Thor í Hósvík, men enn er eingin avgerð tikin um tað.

## Væl egnaðar

Tvíkiljur eru sera væl egnaðar sum alivinnuna, tí tær eru breiðar og hava tí góðan stabilitet og góð berievni. Harafturat orka tær væl at toga. Tvíkiljurn, sum nú verður gjørd til Pan Fish Faroes, er 12 metrar long og seks metrar breið, og teir báðir motorarnir vera 270 hestar hvør. Tvíkiljan, sum Luna hevur bílagt, verður 15,5 metrar long og seks metrar breið og skal hava tveir 300 hesta motorar.



Umframt sjálvan skrokkin ger letlendska skipasmiðjan tangar, lúkur, mastur og stýrihúsið. Motorarnir verða settir í í Føroyum eins og gervi, aksil, krani og øll útgerðin í stýrihúsinum.

Motorarnir eru av slagnum Iveco, sum KJ Hydraulik umboðar, og kranarnir eru av slagnum Pallfinger, um fyritøkan á Kambsdali eisini umboðar í Føroyum.

Hinir veitararnir eru J-El á Eiði, sum ger tað elektriska arbeiðið, Jón Jacobsen á Eiði, sum ger timburarbeiðið, P/F Sandblásing, Ljósá stendur fyri sandblásing og metalisering, og Radiobúðin í Runavík letur útgerðina í stýrihúsinum.